

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 11 - 2012

# Eldur í oljupalli

Tveir menn eru deyðir, og fleiri hava fingið skaða, eftir at eldur kom í ein oljupall í Meksikoflógva í gjár. Tað skrivar Reuters, men amerikanska sjóverjan vil ikki vátta, at nakar er deyður. Peter Gautier hjá sjóverjuni sigur, at framleiðslan á pallinum lá still, tá eldurin kyknaði, og tí er lítil vandi fyri nakrari dálking, sigur hann. Sum skilst kyknaði eldurin í sambandi við umvælingararbeiði. Pallurin stendur á grunnum vatni tætt við Black Blanche-víkina í statinum Louisiana einar 15 fjórðingar úr Grand Isle. Tað er felagið Black Elk Energy, sum eigur hann.